### Sofus Gregersen:

# Sjómark millum Lorvík og Gøtu



**Sofus fer frá at sigla við fiskiskipi at sigla við farmaskipi. Eisini greiðir hann frá "fiskimarkinum" millum lorvíkingar og gøtumenn**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**3. og seinasti partur**

Várið 1936 fór eg ein túr við Silver Lining, sum teir við Misá í Vági tá áttu. Eg var smyrjari, Hans Jacob Abrahamsen, var skipari, og Hendrik Hammer, pápi Óla Hammer, báðir úr Oyndarfirði, var motorpassari. Vit vóru seinir á veg, men komu í fisk í Meðalandsbuktini. Kokkurin hevði einki skil á proviantering, og táið vit høvdu roynt einar 14 dagar, sigur kokkurin, at tað er eingin proviantur eftir, og vit máttu fara inn eftir provianti. Tá var so langt liðið út. Skipið skuldi til Bjarnoynna. Hans Jacob skuldi bert vera við hendan túrin, so vit fóru bara heim.

Tá eg kom heim skuldi Óla Hans Olsen, systkinabarnið, føra Maritana. Hon var ein stór slupp, sum Jaspur Hjelm í Vági átti. Maritana skuldi til Grønlands, og Óla Hans manglaði ein mann. Eg slapp so til Grønlands við honum.

Tað var ein ordans túrur. Vit fingu 800 kr fyri túrin, sum var nógv tá. Eg var vanur við sjálvdrátt, men nú var tað felags fiskarí. Vit fiskaðu við línu frá bátum. Hetta var á sama hátt, sum føroyingar royndu við línu fyrr við troði, táið línan varð rekt út.

Vit høvdu tríggjar bátar og nýttu árar. Hetta var eitt rættuligt knoss.

Men í góðum veðri kundi hetta vera sera stuttligt. Eg var so við Maritanu framm til 1938.

Anthon Hansen, beiggi Sámal, fór í 1939 at føra Grønanes úr Vestmanna. Eg var bert við tað árið.

So fór eg til sildafiskarí undir Íslandi við Signhild hjá Jógvan Jensen í Havn. Tað miseydnaðist fullkomiliga. Vit høvdu ov ringan bassa, sum var íslendingur.

Vit settu einaferð um ein boða í Húnaflóðanum og álaðu nótina sundur. So at rimpa hana saman aftur. Men tað riggaði ikki, og hon fangaði ongantíð. Men tað var nógv sild, so her var okkurt skeivt atborið. Vit fingu seinni ein annan bassa. Tá fingu vit tað sama sum aðrir, men tað var bara ov seint.

Sildin varð landað til bræðingar á Langanesleiðini.

Tá var annar heimsbardagi byrjaður. Á leiðini heim vórðu vit steðgaðir av bretum norðanfyri Føroyar. Teir høvdu brúk fyri at vera varnir. Men tað var alt í lagi, táið teir fingu at vita, hvørjir vit vóru.

Tá førdi Høgni Lómstein, svágur, sluppina Carl hjá Jaspur Hjelm í Vági. Eg fór so við har. Høgni dugdi væl at fáa fisk. Vit fingu tvær ferð uppí hana av saltfiski í 1940. Eg var kokkur. Annars havi eg verið alt við skipi uttan skipari!

Vit sigldu eina ferð upp eftir og sóu so nógvan fugl. Vit kasta, tað var farið um midnátt. Teir fingu ikki botn, so nógvur fiskur var. Vit fingu einar fýra dagar á sama hátt. Hetta var fyrstu ferð, eg upplivdi slíkt. Men knappliga føldist ikki fiskur aftur. Men hetta var ein góð byrjan á túrinum, og vit fingu skjótt uppí. Vóru menn hepnir komu teir soleiðis fyri.



*Óla Hans var eisini skipari hjá Sofusi. Her saman við konuni Oluffu, systkinabarn Sofus*

Høgni riggaði væl sum skipari. Tað lá eisini væl fyri hjá honum at læra. Hann fór á skiparaskúla á heysti, og á jólum var hann liðugur at rokna tað, sum kravdist til setiskipara. Tá teir fóru til próvtøku um várið, var hann longu liðugur at rokna alla longdina. Hetta var eitt eykaprógv, sum kravdist fyri at kunna fara til Grønlands.

Høgni fór so spakuliga avstað, men eftir at hann gavst undir krígnum, gjørdist hann ikki skipari aftur. Erika, kona hansara, doyði so ung í 1962, bert 53 ára gomul.

**Fekk konu og børn**

Í 1941 giftist eg við Zelindu, dóttir Onnu Louisu og Johan David Jacobsen úr Norðragøtu, umrøddur í seinasta parti.

Tá fór eg at koyra fisk við bili. Mamma doyði í 1933 og pápi í 1938, so húsið var nakað óhjálpið. Hanna systir, sum seinni giftist við Leon Joensen, tók sær av húsinum til hon giftist.

Við Zelindu kom so konufólk aftur í húsið. Hon var so sera røsk. Hon hevði sum aðrar gentur tá í tíðina havt húspláss. Hon hevði millum annað verið í húsi í Klaksvík hjá systkinabarni sínum Katrinu Kallsberg, mammu Anfinn. Tá Zelinda seinni fór at arbeiða í fiski, búði hon altíð hjá Katrinu, sum var sera ættarkær. Katrina gjørdist gott 90 ára gomul. Hon var dóttir Johonnu Sofíu og Tummas í Funningsfirði, sum doyði av meslingum í 1916, sum greitt frá í seinasta parti.

Fyrst í 1942 fór eg so aftur við Carl, sum Niels Juel á Vollanum førdi. Hann var so við tann túrin, men tá gavst hann at sigla.

Vit sigldu til havnir í Íslandi at keypa fisk uppí skipið. Viðhvørt var neyðugt at bíða. Men tá fiskurin var at fáa, gekk eisini skjótt. Tað var vanliga bert eitt samdøgur frá tí, vit byrjaðu at fáa fisk, til skipið var fult. So var at sigla og sum skjótast at koma á marknaðin. Vit skuldu halda okkum til eina bestemta siglingarleið.

Vit vóru ikki út fyri nøkrum beinleiðis vandastøðum, men vit sóu minur og flogfør. Eina ferð sleptu vit eina ballón við línu upp. Hon skuldi vera verja móti ágangandi flogførum. Tey skuldu ræðast at koma ov nær fyri ikki at fáa línuna um propellina.

Eg var í Íslandi í 1944 við Esther hjá teimum á Seglhúsinum. Tá slapp eg umborð á Eldoyggj á Akureyri til sildafiskarí. Vit trolaðu fyrst, og so fóru vit við nót. Vit fingu nógva sild og gjørdu eitt gott ár.

**At fiska eftir kríggið**

Eg fór í 1945 sum kokkur við Føroyinginum hjá Dánjal Jákup í Skipshandlinum við Óla Hans sum skipara. Her var eg við til 1947. Vit fóru á Suðurlandið at fiska til ísfisk. Tað gekk væl, og vit gjørdu fleiri túrar. Tað skjótasta vit fingu uppí var hálvatriðja dag. Óla Hans var góður skipari. Hann kundi vera eitt sindur boysin, men hann var góður við fólkið.

Hetta sást eisini, táið vit lógu inni sunnudagar. Summir skiparar vóru so grammir, at teir vildu liggja klárir at kasta á midnátt sunnukvøld. Men hetta kom at gerast eitt rættuligt tørn hjá manningini, tí hesa náttina fekst eingin svøvnur.

Aðrir lótu menninar til dømis sleppa í biograf



*Sofus í góðum árum*